HURÐAR



# HDYGD PLASTHURÐAR

## Dyrnar eru andlitið á heiminum

### Fyllingshurðar

Vit hava valt at hava 11 ymiskar fyllingshurðar sum standard. Tær hava nøvn eftir føroyskum blómum. Hesar fyllingar eiga vit á goymslu. Brævsprekka og hurðabankari eru ikki standard. Tær fáast í hvítum á útsíðu og innsíðu, og mahogni á útsíðu og hvítum á innsíðu. Aðrir møguleikar eru eisini. Er ynski um eina dýrari dygdarfylling, útvega vit hana frá Repol í Týsklandi, sí www.repol.de/kunststoff/kunststoff1.htm. Hesar mugu bíleggjast í góðari tíð.



Umframt hvítar hurðar ber eisini til at velja tríggjar aðrar litir uttan: Svarta eik, mahogni og brúna eik

Umframt hvítar hurðar ber eisini til at velja tríggjar aðrar litir uttan: Svarta eik, mahogni og brúna eik. Fyllingshurðarnar fáast tó ikki í svartari og brúnari eik. Eisini ber til at fáa hurðina sproytaða hjá autolakerara í øllum RAL-litum.

Hurðarnar verða gjørdar eftir máti, so tær hóska júst til tín tørv.

Glaslistar eru altíð á innaru síðu. Hetta ger hurðina trygga og hindrar innbroti.

Karmgátt er standard. Tá er dupultur pakningur allan vegin runt. Saman við 4-punktslæsing ger hetta hurðina fløskutætta.

Eisini ber til at fáa lága aluminiumsgátt.



Altanhurð Sprossi Úthurð

HDYGD

HDYGD I Í GEILINI 2 I FO-385 VATNSOYRAR I FAROE ISLANDS
Tel.: +298 332177 I Fax: +298 333166 I www.hdygd.fo I post@hdygd.fo




Hvønn veg skal hurðin ganga?